# – Eg føli ikki at eg misti á stokkinum

Jacob Vestergaard, sum nú er fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, følir ikki, at hann hevur mist á stokkinum í spurninginum um makrelin. – Vit hava fingið hesa kvotu heim, sum er verd umleið eina miljard krónur, sigur hann



*- Eg ivist onga løtu í, at vit tóku røttu avgerðina. Tað eru mál, sum eg harmist um ikki at fáa høvi at føra út í lívið, men vit kunnu ikki vera við til at lata fíggjarlógina flóta, sigur Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum*

Vilmund Jacobsen

Tá Sosialurin skifti orð við Jacob Vestergaard seinnapartin í gjár, var hann staddur á North Atlantic Fish Fair í Klaksvík, har fiskivinnustevnan endaði út á seinnapartin.

– Eg ætlaði mær altíð at vitja stevnuna, tó at nógv hevur verið um oyruni seinastu dagarnar. Nú eg ikki eri landsstýrismaður meiri, men vanligur løgtingslimur, er áhugin líka stórur kortini. Nú gav eg mær so eina løtu at vitja fiskivinnustevnuna.

## Skilja støðuna

Jacob Vestergaard sigur, at hann hevur hoyrt frá nógvum fólki, síðan tað í gjár gjørdist greitt, at hann og Annika Olsen ikki longur eru landsstýrisfólk.

– Eg haldi, at fólk sum heild eru nøgd við ta støðu, sum flokkurin tók. Nú var tað komið har til, at vit ikki kundu geva okkum meiri. Vit vildu ikki verða við til at leggja meiri trýst yvir á vinnuna, samstundis sum vit ongar – ella ov lítlar sparingar – síggja innan almenna sektorin.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin sigur við Sosialin, at tá hinir flokkarnir í samgonguni gingu prinsippunum hjá flokki hansara so nær, sum ætlanin var við játtanarkarminum, noyddist flokkurin at taka hetta til eftirtektar.

– Tað, sum harmar meg mest, er, at eg ikki fái høvi at býta makrelin út til skipabólkarnar, soleiðis at flest møgulig skip og manningar kundu fingið ágóðan av øktu makrelkvotuni.

Hetta segði Jacob Vestergaard við Rás2 í gjár, eftir tað var vorðið greitt, at Fólkaflokkurin ikki longur stuðlar samgonguni.

Hann legði aftrat, at hann er púra avkláraður við støðuna og helt, at flokkur hansara ikki kann standa "modell" til tað, sum nú liggur í kortunum.

– Eg ivist onga løtu í, at vit hava tikið røttu støðuna. Tað eru mál, sum eg harmist um ikki at fáa høvi at føra út í lívið, men vit kunnu ikki vera við til at lata fíggjarlógina flóta, segði hann.

## Einki er mist

Tað er eingin loyna, at Jacob Vestergaard hevur verið maðurin, sum seinnu árini hevur gjørt hol í sjógvin við at trýsta Noreg og ES til eina – fyri Føroyar – betri avtalu í býtinum av heildarkvotuni av makreli.

Í fjør fekk hetta ikki avleiðingar í sínámillum fiskiveiðiavtalum millum londini, men í ár hava hvørki Noreg ella ES viljað gjørt fiskiveiðisáttmála við Føroyar. Avleiðingarnar eru, at føroysk skip ikki sleppa at fiska tosk í norska partinum av Barentshavinum, og føroysk rækjuskip missa eisini síni rækjurættindi í Grønlandi, tí Grønland er limur í ES.

Onnur rættindi, sum Føroyar hava havt við sínámillum fiskiveiðiavtalum við Noreg og ES, eru eisini mist í 2011.

Men hetta ræddi ikki fyrrverandi landsstýrismannin í at seta krøv – og at standa við tað, sum hann hevði sagt.

Sosialurin spurdi Jacob Vestergaard, um hann ikki følir, at hann hevur mist á stokkinum, nú hann ikki slapp at verða við til at býta makrelkvotuna millum skipabólkarnar.

– Nei, tvørturímóti. Eg føli ikki, at eg misti á stokkinum. Við makrelkvotuni fyri 2011 er komin heim til føroyska samfelagið, og henda kvota hevur eitt virðið av umleið einari miljard krónum.

## Líka fyri lógini

Jacob Vestergaard sigur seg vóna, at tey, sum nú koma at taka avgerðirnar um býtið, hugsa um, at henda kvota eigur at koma flest møguligum til góðar.

– Kunngerðin liggur klár, men hon er ikki send til hoyringar hjá Fiskivinnuráðnum. Eg helt tað ikki vera rætt av mær at senda kunngerðina til hoyringar, tá hendan støðan í samgonguni tók seg upp. Hvussu verður nú, vita vit ikki, men eg fái meg illa at trúgva, at tað verður Tjóðveldi, sum fer at hjálpa einum sambandsløgmanni at fremja eitt býti, har nótaflotin sleppur at fiska ókeypis, meðan aðrir bólkar skulu gjalda fyri síni rættindi, sigur Jacob Vestergaard, nú fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

vilmund@sosialurin.fo

**» Tað, sum harmar meg mest, er, at eg ikki fái høvi at býta makrelin út til skipabólkarnar, soleiðis at flest møgulig skip og manningar kundu fingið ágóðan**

JACOB VESTERGAARD




*- Eg fái meg illa at trúgva, at tað verður Tjóðveldi, sum fer at hjálpa einum sambandsløgmanni at fremja eitt makrelbýti, har nótaflotin sleppur at fiska ókeypis, meðan aðrir bólkar skulu gjalda fyri síni rættindi, sigur Jacob Vestergaard*